SKYN

Nýtt

# Ikki bert ognir, men heim



## HOYVÍK
Sethús, Guttormsgøta 11

| | | | |
|---|---|---|---|
| 230 | 540 | 2 | 1998 |

Sera góð sethús í Hoyvík. Húsini eru í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er køkur, stova, grovkøkur, hjallur, baðirúm við baðikari og brúsu og tvey kømur. Í niðaru hæddini er gongd, trý kømur, baðirúm við brúsu, vaskirúm og garasja. Laðaður grótgarður er framman fyri húsini, og eisini er ein góður sólkrókur. Húsini standa sera væl fyri í barnavinaligum og friðarligum umhvørvi beint við dagstovn og skúlar. Bussambandið er gott. Húsini hava nakað av útsýni, og parkeringsviðurskiftini eru góð.

Prísuppskot: kr. 2.355.000








SENDISTOVAN

## TÓRSHAVN
Raðhús, Vesturgøta 1



| | | | |
|---|---|---|---|
| 148 | 110 | 3 | 1986 |

Ljós og hugnalig raðhús í trimum hæddum við íbúð í niðastu hæddini. Í miðhæddini er durur, gongd, stova og køkur. Í ovastu hæddini er gongd, baðirúm og trý kømur. Í íbúðini niðriundir er durur, gongd, køkur/fýrrúm, stova/kamar og baðirúm. Hjallur hoyrir til ognina. Talan er um endaraðhús, sum eru væl hildin. Húsini standa í barnavinaligum umhvørvi, og stutt er til handils, dagstovn, Handilsskúlan og Tekniska skúla. Busssambandið er gott.




Prísuppskot: kr. 1.950.000

## TÓRSHAVN
Sethús, Heygskrókur 6



| | | | |
|---|---|---|---|
| 194 | 529 | 2 | 1975 |

Sethús í vesturbýnum við góðum útsýni. Húsini eru í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er durur, gongd, tvey kømur, vesi, baðirúm, køkur, stova, vaskirúm/fýrrúm og hjallur. Á loftinum er loftsstova, eitt stórt kamar, trý onnur kømur og tekøkur. Vindeyguni vórðu skift í 2005, og baðirúmið gjørt av nýggjum í 2004. Stórur urtagarður er rundan um húsini, sum standa í friðarligum umhvørvi við blindveg. Stutt er til handils og skúla, og graslíkisvøllur er beint við.




Prísuppskot: kr. 2.380.000